betri
DEILDIN

# LEIKSKRÁ

08. OKTOBER 2023

SKRÁ NR. 12




ELIAS LERVIG NR. 22

EB/STREYMUR
SAMAN STANDA VIT STERK
1993

# 25. UMFAR

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo




# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD


Dysturin í dag

Støðan í Betri deildini

TEAM ÍF

TEAM EB/Streymur

Dómarar

Toppskjúttar eftir 24 umfør

Brot úr gamlari leikskrá

ÍF-sangurin




INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



TEKST: **BIRGIR PETERSEN**

# DYSTURIN Í DAG

Vælkomin til dyst í Betri-deildini, í dag taka vit móti sundalagsmonnum, og eru hesir dystir altíð spennandi og javnir. Seinasta heimadyst fingu vit ein søtan sigur móti AB, sum merkti at vit sluppu av aftasta plássi og tættari bjargingini. So man kann siga at nú vita vit hvat skal til, tí okkara lið vísti sannan stríðsanda.

Seinasta umfar leiktu vit í Klaksvík móti nógv tí sterkasta liðinum í landinum, og fingu vit ikki forða fyri at teir tryggjaðu sær triðja meistaraheiti á rað, júst við at vinna á okkum. Stórt tillukku verður ynskt KÍ hiðani.

Allir menn eru tøkir hjá okkum, og týdningarmikið hjá okkum at leggja nógv fyri í dag, soleiðis at okkara mál, at tryggja framhaldandi luttøku í fremstu deildini, kann náast. Um vit vinna í dag, so kann hetta enn liggja í okkara egnu hondum, so kravið er rættiliga einfalt. Næsta umfar møta vit jú einasta liðinum, sum vit í veruleikanum hava møguleika at fanga aftur, tá TB kemur á vitjan.

Góðan dyst øll somul.

**Koyri á drongir**






VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

# EFTIR 24 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 24 | 21 | 2 | 1 | 64 | 16 | +48 | 65 |
| 2 | B36 | 24 | 17 | 2 | 5 | 49 | 23 | +26 | 53 |
| 3 | Víkingur | 24 | 16 | 3 | 5 | 63 | 22 | +41 | 51 |
| 4 | HB | 24 | 15 | 4 | 5 | 61 | 22 | +39 | 49 |
| 5 | 07 Vestur | 24 | 11 | 4 | 9 | 40 | 36 | +4 | 37 |
| 6 | EB/Streymur | 24 | 7 | 3 | 14 | 25 | 44 | -19 | 24 |
| 7 | B68 | 24 | 4 | 9 | 11 | 27 | 43 | -16 | 21 |
| 8 | TB | 24 | 4 | 4 | 16 | 14 | 55 | -41 | 16 |
| 9 | ÍF | 24 | 5 | 0 | 19 | 22 | 67 | -45 | 15 |
| 10 | AB | 24 | 4 | 1 | 19 | 21 | 58 | -37 | 13 |

WWW.DYSTIR.FO

## 25. UMFAR

| | |
|---|---|
| 08.10.23 | B36 - 07 Vestur |
| 08.10.23 | B68 - Víkingur |
| 08.10.23 | TB - HB |
| 08.10.23 | ÍF - EB/Streymur |
| 08.10.23 | AB - KÍ |

## 26. UMFAR

| | |
|---|---|
| 22.10.23 | HB - 07 Vestur |
| 22.10.23 | Víkingur - EB/Streymur |
| 22.10.23 | B36 - KÍ |
| 22.10.23 | B68 - AB |
| 22.10.23 | ÍF - TB |


KES.FO
HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE
Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.
Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.
DVI energi
INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | |
|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 |
| Elvio **Gelmini** | 2 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 |
| Tóri **N. Olsen** | 4 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 |
| Karl **A. Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| uben **Møller Nielsen** | 8 |
| Jhon **Mena** | 9 |
| Jóhan **Petersen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Hans Jákup **Lervig** | 12 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 |

| | |
|---|---|
| Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Líggjas **Heðinsson** | 16 |
| Jóhann **Højbro** | 17 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Aron **Kensson** | 20 |
| Rógvi **Matras** | 21 |
| Elias **Lervig** | 22 |
| Hans **Jacobsen** | 23 |
| Gonzalo **Zárate** | 24 |
| Bergur **Jacobsen** | 25 |
| Sámal **Zachariassen** | 34 |

Høvuðsvenjari: **Aleksandar Jovevic**
Hjálparvenjari: **Bartal Eliasen**
Málmansvenjari: **Erling Joensen**
Fysiskur venjari: **Gudmundur Danielsen**
Fysioterapeutur: **Jónfríð Hansen**
Liðleiðari: **Rói D. Olsen**
Liðleiðari: **Heðin L. Olsen**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**

INNIHALD

EB/STREYMUR

SAMAN STANDA VIT STERK

1993

| | | | |
|---|---|---|---|
| Jóanes **E. Davidsen** | 1 | Rani **Hansen** | 18 |
| Gutti **Jóhansson** | 2 | Ábraham **K. Joensen** | 19 |
| Rani **í Soylu** | 4 | Virgar **Jónsson** | 20 |
| Mikkjal **Hellisá** | 5 | Hans Pauli **á Bø** | 21 |
| Dánjal **Godtfred** | 6 | Hannus **Eiðisgarð** | 23 |
| Rógvi **Egilstoft** | 7 | Jákup **Hummeland** | 24 |
| Tóki **Johannesen** | 9 | Andras **Olsen** | 26 |
| Bogi **Reinert-Petersen** | 10 | Bergur **J. Poulsen** | 30 |
| Markus **Hellisdal** | 15 | Arnar **Dam** | 31 |
| Fayo J. **K. Kruse** | 16 | Gutti **Dahl-Olsen** | 44 |
| Steven **van Dijk** | 16 | Filip **Djordjevic** | 99 |
| Niels Pauli **Danielsen** | 17 | Sverri **Mariusarson** | |
| | | Elias **Isaksen** | |

Høvuðsvenjari: **Sigfríður Clementsen**
Hjálparvenjari: **Arnbjørn Hansen**
Liðleiðari: **Ólavur H. Ejdesgaard**
Liðleiðari: **Eyðfinnur Joensen**
Liðleiðari: **Esmar Eiðisgarð**

**INNIHALD**

DÓMARI

Árni B. **Petersen**

1. HJÁLPARDÓMARI

Andrew **Christiansen**

2. HJÁLPARDÓMARI

Djóni **Jacobsen**

4. DÓMARI

Kári J. **á Høvdanum**

DÓMARAEYGLEIÐARI

Niklas **á Líðarenda**

magn




Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 17 |
| 2 | Adrian **Justinussen** (HB) | 16 |
| 3 | Martin **Klein Joensen** (Víkingur) | 15 |
| 4 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 15 |
| 5 | Mikkel **Dahl** (HB) | 13 |
| 6 | Árni **Fredriksberg** (KÍ) | 13 |
| 7 | Valerijs **Sabala** (B36) | 10 |
| 8 | Brian **Jakobsen** (AB) | 9 |
| 9 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 8 |
| 10 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 8 |

WWW.DYSTUR.FO

NÝRÙM

Teknistova

einar@nyrum.fo

tlf 78 88 99



GREIN TIKIN FRÁ
LEIKSKRÁ NR.8 FRÁ 2000

# SØGA

EFTIR: PETUR SIGURÐ RASMUSSEN

## Hesaferð hugleiðir Petur Sigurð um tíðina, tá ÍF leikti hondbólt á kaiuni, og tá hann møtti Hjalmar fyrstu ferð.

Nei, eg eri ikki fuglfirðingur, men viðhvørt bera kenslur á tað borðið, at eg føli meg sum ein slíkan. Fyrsta samband mítt við Fuglafjørð var ein hondbóltsdystur norðuri á kaiuni millum okkum (Neistan) og FÍ. Meini at ÍF varð nevnt soleiðis tá, men eri ikki heilt vísur í tí. Men óhepna samansetingin av bókstavum varð seinni broytt til ÍF. Slík vitjan var altíð ein veitsludagur fyri okkum leikarar tá. Boðnir inn til blíðskap frá morgunstund av. Hetta var í 1951. Sjálvur fekk eg óføra í heiminum hjá Eilifi Samuelsen.



*Petur Sigurð Rasmussen fyrrveranadi formaður ÍF's handar Hjalmar, tá verðandi formanni ÍF's, gávu. Myndin er frá 40 ára stovningardegnum hjá ÍF í 1986*

Tann dagin hitti eg fyrstu ferð navnframa fuglfirðingin, Hjalmar Joensen, skynsamur og prátingarsamur sum altíð. Annað sambandið við fuglfirðingin fekk eg í Føroyingahavnini í Grønlandi. Og hetta var í 1954. Har kom maður móti mær við innvavdari hond. Míni fyrstu orð vóru: „Oy Jesus, var tað tú". Fuglafjarðarskipið „Hjørdis" sigldi inn við skaddum manni – eldur kom í skipið, ið síðan sakk. Manningin varð bjargað, og hin skaddi maðurin gongur í dag ímillum okkum, við bert fýra fingrum á aðrari hondini – tummulin manglar.

Nógva orku hevur hann síðan lagt í ÍF sum formaður í fleiri ár. Og øll kenna hann. Sama árið, í 1954, var eg læraravikarur í Kollafirði – Alt av tilvild. Eftir páskir í 1955 helt eg á sum vikarur í Fuglafirði. Hetta fram til Ólavsøku – hetta var eisini av tilvild. Hetta vóru nakrir fantastiskir dagar, har eg sum ítróttarmaður varð móttikin við opnum ørmum.

Kaiplássið var tá „stadion" í Fuglafirði. Her samlaðist allur ungdómurin. Hatta var í endanum av slupptíðini – vit minnast Pilot, Mazeppu og fl. – so mesta mannfólkið var burtur hesa tíðina. Men kvinnurnar vóru virknar við hondbóltinum. Við Helmu hjá Gordon á odda fóru vit í sving. Hóast primitivu umstøðurnar, má eg siga, at hetta var ein partur av mínari allarríkastu ungdómstíð.

Eftir lokið læraraprógv í 1958, má eg hava alt hetta í huga, tá Herluf Berthelsen, sáli – sum tá var sálin í ÍF - kláraði at „shanghaia“ meg til fast starv í Fuglafjarðar skúla. Alt hetta má vera lagnunar speisemi – Kona mín, Lena er fuglfirðingur. So, tá ÍF hevur vunnið dyst, plaga abbasynirnir at spyrja: „omma, ert tú ikki glað“ – men tá svarar abbi: „jú, tað eri eg“.



*Herluf Berthelsen, sáli, ein av stovnarunum hjá ÍF og undangongurmaður í nevndararbeiðið felagsins mongu árini, vísir errin fram vimpul á 40 ára føðingardagsveitsluni hjá ÍF í 1986.*

BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

TAKK FYRI STUÐULIN

**Leiðandi reiðarí í norðurhøvum**




VARÐIN P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo




Januar LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan …**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan …**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan …**